Her var stórsligið at koma inn, men merkiligt nærum einki orð at skilja.

Vit landaðu sjálvir og hava sæð nakað rokasligir út. Konur gingu framvið og hugdu, og teimum tyktu synd í hesum neyðars dronginum, og tað var meg, tær meintu við.

Longu kvøldið eftir var klárt at fara avstað aftur. Tíð var til onkran lítlan túr í landi, har vit kundu keypa okkurt hissini. Jústines býtti til manningina tað, sum fekst við søluna av nøkrum tunnum av toskalivur. Hetta rakk til tvey gløs av sultutoy, eina dós livurpostej, ein lítlan ost og eitt sindur av góðgæti. Hinir keyptu nakað tað sama, og hetta deildu vit við hvønn annan, tá ið vit fóru út aftur. Hetta rakk í 14 dagar. So var slutt við hesum forkunnuga kosttilskoti. Vit saknaðu tað nógv.

## Sjúkir av longsli

Vit byrjaðu nýggja túrin við góðum fiskiskapi. Men summir høvdu mist hugin at byrja aftur. Tað var longsulin, sum gjørdi um seg. Hetta var ein rættilig sjúka. Víst høvdu teir frætt heimani frá inni á Seyðisfjørðinum, men hetta gjørdi ikki longsulin minni. Ein maður umborð hjá okkum longdist so illa, at skiparin mátti skaffa honum fart heim við eini slupp sum skuldi heim. Maðurin var tá mestsum lagstur í koyggjuna.

Tá komið var út til endan av august, nærkaðist tíðin at fara heim. Veðrið ilskaðist, og tá var farið inn á Skála við Langanes at fáa vatn og ís. Hetta var eitt kent útróðrarpláss hjá føroyingum.

Her bar ikki til at leggja at, so alt varð flutt við báti, vatnið í tunnum og ísurin í sekkjum. Posturin kom eisini higar. Hann var ofta mánaðir gamal. Brøvini vóru til giftu menninar og so eini tvey brøv til forlovaðar dreingir. Eitt bræv var eisini til mannin, sum var farin heim. Nøkur gomul bløð komu eisini, men tey vóru tó nýggj fyri okkum, sum ikki høvdu sæð eitt blað í 11-12 vikur.

Her var nú savnaður ein heilur floti av skipum, sum komu inn at kroka. Øll høvdu okkurt at gera á Skála, summi tó bert eftir posti.

Eftir tveimum døgum minkaði vindurin, og nú skundaðu øll skipini sær út aftur á Nesgrunnin. Nú var gott lag. Fiskaríið var gott, og so høvdu vit keypt eitt lamb frá einum bónda, og vit flettu umborð. Goldið var við umbýti av teimum vørum, vit høvdu umborð, eisini snús. Bæði bóndin og konan hansara snúsaðu.

I september gjørdist dagarnir styttri og styttri, og samstundis tíðin tað kundi standast við snøri. Hetta var bert gjørt í ljósi.

Tað skuldi givið longri frívakt, men veiðan var so stór, at tað tók langa tíð at reinsa. Men nú vóru umstøðurnar verri til tess. Fyrr um summarið var ljóst alt samdøgrið. Nú var veðrið verri, og tað var eisini myrkt. Arbeiðsljósið var flagermúslyktir, sum brendu petroleum, og hesar lýstu ikki nógv upp. Menn vóru ofta so móðir, at tað hendi, at teir sovnaðu, sum teir stóðu, undir reinsingini av fiskinum.

Endin var so, at saltið varð uppbrúkt og lastin var full.

## Skomm at brúka luktilsisápu

Reinførið umborð var so sum so, vatnið skuldi sparast. Men sunnudag fingu menn kortini vatn, so teir kundu raka sær.

Alt hetta førdi til lús umborð. Hetta var sum í dag ikki nakað, sum tosað varð um, men vit høvdu lúsafræ, so lýsnar vórðu fyribeindar í øllum góðum.

Heimani frá høvdu vit eisini sápu. Mamma hevði pakkað mær luktilsissápu, og hesum varð eg argaður við. Rættir menn nyttu ikki konufólkasápu. Slíkir menn kundu ikki fáa fisk. Teir hildu seg til Sunlight!

## Aftur feskan mat

So er tað aftur maturin í september. Eg havi nevnt, hvussu gott tað var at fáa feskt lambakjøt til døgurða. Kjøtdagarnar, tá vit annars fingu saltkjøt, fingu vit nú fekst kjøt mánadag. Blóðpylsu fingu vit mikudag, og fríggjadag fingu vit amerikanska saltkjøtið. Justines hevði eisini keypt tríggjar tunnur av íslendskum lambskjøti, og hetta smakkaði betri enn tað amerikanska.

Men so byrjaði kjøtið at ganga undan, men lagið var kortini gott, tí nú sluppu vit skjótt heim. Síðsta sunnudagin fingu vit blikkamat til døgurða. Hetta var amerikanskt konserves, og hetta gjørdist dagligur kostur. Men okkum dámdi tað, hóast tað hevði allan møguligan tilsetning. Tað varð nógv tosað um, hvat ið kundi vera í hesum blikkdósum. Við okkum var ein skemtiligur dani, Lundsbjerg, sum var búsettur í Fuglafirði. Hann skemtaði við, at tað vóru hakkaðir indianarar í dósunum.

Fisk fingu vit framvegis ásettu dagarnar. Hetta var vanliga toskur. Men nú góvu vit ilt av okkum, tá kokkurin tvær vikur úti í eitt kókaði upsa, sum okkum ikki dámdi nakað serliga væl. Men skiparin hevði givið boð um, at toskur skuldi ikki etast. Hann var so stórur og tískil virðismikil.



*Harald fór fyrsta túrin við Silver Lining við Justines Eidesgaard sum skipara*

Seinni fingu vit meira av smáfiski, toski. Og tá sluppu vit undan upsanum til døgurða. Tað besta var tó at fáa steiktar kjálkar.

## Hetjurnar

Tað var nógv tosað umborð. Tær veruligu hetjurnar í okkara verð vóru tey skip og teir skiparar, sum veruliga fiskaðu væl. Tað var eisini sagt, at hesi høvdu besta og mest útvalda fólkið. Tað ljóðaði eisini, at teir bestu skipararnir høvdu eina serliga nøs fyri, hvar fiskur var at fáa. Tað vóru nógvar søgur og nógv reyp um hesar rokarar, og ofta var nakað væl lagt afturat. Ein sportur hjá fiskimonnum var eisini at kenna nøvnini á so nógvum sum gjørligt av teimum 150 skipunum, sum royndu undir Íslandi.

## Endiliga heim

Nú varð tosað um, nær vit mundu fara at sigla heim. Nógv var tosað um javndøgursstormarnar seinast í september, sum fiskimenn ræddust. Men teimum sluppu vit undan. Tann 27. september fóru vit at sigla heim í fylgi við fýra øðrum skipum. Øll flaggaðu til avskeð, og vit sóu Ísland hvørva í havsbrúnni í einum heglingsæli, og tá vit sóu Føroyar, var eisini kavi í fjøllunum.

Skipið fór til Keypmannahavnar at landa lastina. Síðan fór tað til Svøríki, har tað fekk motor ísettan.

Avrokningin fyri túrin var kr. 250 aftaná frádrátt fyri kr. 100 í útgerð. Eg var blivin ríkur maður!



*Mynstrað varð í handlinum hjá Jóan Paula, tá ið menn fóru burtur. Hann er niðara húsið, sum stendur oman og niðan inni móti bygdini. Hann búði í ovaru húsunum.*

**Komandi partur**
Í komandi parti greiðir Harald frá grønlandsferð í 1929 við Silver Lining. I seinastu pørtunum greiðir hann frá, tá teir gingu burtur við Arizonu í 1932 í sama illverðrinum, sum beindi fyri Lauru og Immanuel. Henda frásøgnin er sera áhugaverd, tí hon lýsir sera gjølla eina bjargingartilgongd.

Sosialurin